# Konsert í Fríðrikskirkjuni



Aftur í ár fer "Kórið hjá Jóhan" at hava jólakonsert í Fríðrikskirkjuni. Kórið, sum er eitt blandað kór við einum 35 sangarum, er í høvuðsheitum mannað við sangarum úr økinum kring Skálafjørðin

Á skránni hjá kórinum verða kendir sálmar og jólasálmar. Harumframt verða "Halga nátt", "Dýra, heilaga" og "Jesus bleibet meine Freude" at hoyra. Jórun Hansen fer at spæla undir hjá kórinum.

Umframt kórsang fáa áhoyrararnir høvi at hoyra nakrar næmingar av tónleikabreytini í skúlunum í Runavík / á Toftum. Næmingarnir á breytini sleppa gjøgnum árið at royna seg á ymsum økjum innan tónleik – eisini í klassiskum solosangi. Á skránni er "Panis angelicus" av Cesar Franck, "Wiegenlied" av Mozart og tvær ariur burtur úr "Messias" av Händel. Jórun spælir eisini undir hjá næmingunum á tónleikabreytini.

Høvuðspartin av skránni hevur "Kórið hjá Jóhan", sum henda sama dagin syngur til guðstænastu í kirkjuni á Skála klokkan 11 og í kirkjuni á Strondum klokkan 12:15.

Konsertin í Fríðrikskirkjuni byrjar klokkan 20:00.

























